# Bjarki stillar ikki uppaftur

**Restin av húskinum er farin av landinum í útbúgvingarørindum, og tí væntar Bjarki Mohr ikki, at hann kann binda seg til tvey ár afturat í nevndararbeiðnum hjá Fótbóltssambandinum**

FSF-AÐALFUNDUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast hann bara hevur sitið tvey ár í starvsnevndini hjá FSF, so hevur Bjarki Mohr hesi bæði árini sett sín sjónliga dám á føroyskan fótbóltspolitikk.

Ikki minst hevur hann bæði verið í brennideplinum og er róstur fyri avgerðina um at leingja føroysku fótbóltslandskappingina. Ein broyting, sum hann var rættiliga skjótur at melda út tá hann var komin í nevnd, og sum eisini - við sera góðum úrsliti - varð gjøgnumførd í fjørð.



*– Tað er sjálvandi keðiligt, tá tú ikki fært arbeitt víðari við lutum, sum tú hevur sett ígongd. Men í verandi støðu haldi eg ikki, at valið hevur verið serliga trupult, sigur Bjarki Mohr, sum eftir tvey ár í FSF-nevndini nú sigur farvæl. Í øllum førum fyribils*

### Flytur við húskinum

Hóast summi kanska hava hildið formannin í kappingarnevindin verið ov bráðræsnan, so tykist stevið í nevndarsamstarvinum at hava verið gott, og tí mundu tey flestu helst eisini vænta, at Bjarki eisini ætlaði at taka við afturvali, tá aðalfundur verður á skránni tann 18. februar.

Men soleiðis verður tó ikki. Í heyst fór restin av húskinum hjá Bjarka av landinum í útbúgvingarørindum, og sjálvur roknar Bjarki við, at tað bert er ein spurningur um tíð, áðrenn hann eisini fyribils flytur til Danmarkar.

– Enn havi eg so ikki sett mær nakra dagfesting. Men eg haldi tað vera skeivt, um eg stilli upp til nevndarvalið, tí tvey ár afturat vænti eg ikki, at verði verandi.

Men er tað ikki eitt sindur hugtungt, um tú soleiðis noyðist at gevast við nøkrum, sum tú hevur verið við til at sett ígongd?

– Tað vil tað altíð verða. Tí talan er jú um nakrar broytingar, sum eg veruliga havi arbeitt fyri. Men fýra ár er alt ov leingi at vera burtur frá restini av familjuni, so í so máta er avgerðin ikki serliga trupul, heldur hann.

### Kappingin hevur broytt nógv

Spurdur, hvørt tað eru einstakir lutir, sum hann hevur verið serliga fegin um hesi bæði árini í kappingarnevndini, sigur Bjarki, at tað eru tað sjálvandi.

– Viðvíkjandi FSF, so haldi eg serliga, at tað er gott, at nevnd og umsiting í felag nú hava orðað ein greiðan málsetning. Ikki minst, tí vit við hesum eisini betri kunnu grundgeva fyri umheiminum, hvussu arbeiðsgongdir og -ætlanir eru hjá okkum.

– Eisini haldi eg tað vera gott, at vit nú fáa eitt veruligt konsept, sum alt landsliðsarbeiðið er bygt á. Nakað sum ger tað lættari at halda fast í eini støðugari menning.

– Og so er tað sjávlandi broytingin í kappingini. Fyrsta árið var hendan í øllum førum framúr vælegnað, og eg haldi eisini, at hetta er nakað, sum kann flyta føroyskan fótbólt. Spælararnir verða betri fyri í allar mátar, og tað kann so bara gagna føroyskum fótbólti, sigur Bjarki Mohr at enda.

So er einasti spurningurin, hvør nýggi maðurin í nevndini hjá FSF verður. Ella um talan kanska verður um fleiri. Umframt Bjarka, standa Óli Holm, formaður, og Magnus á Stongum fyri vali hesaferð. Men tað er tó lítið - ella kanska einki - sum bendir á, at teir báðir verða skiftir út við aðrar kreftir.

# FM-rógvingin verður 11. februar

**Aulan í Eysturskúlanum verður hesaferð karmur um óalmenna FM í innandurarógving. Føroya Sparikassi og Havnar Róðrarfelag hava skrivað undir sponsoravtalu til kappingina**

KAPPRÓÐUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tað verður Aulan í Eysturskúlanum í Havn, sum verður karmur um óalmennu FM-kappingina í innandura kappróðri*

At innandura-rógvingin er komin fyri at vera, man lítil ivi vera um. Seinnu árini er talið av kappingum – og áhugin fyri hesum — vaksin við stórari ferð. Størstu kappingarnar hava verið í Havn og í Runavík, og nú rigga tey í Havn enn einaferð til óalmennu FM-kappingina.

Hendan verður í ár hildin í Eysturskúlanum, og fyrireikararnir úr Havnar Róðrarfelag siga, at freistin at tekna seg fyri luttøku er sett til 7. februar.

Kappingin er her skipað í fleiri bólkum. Bæði viðvíkjandi vekt og aldri, soleiðis at sannlíkindini fyri at kappast á jøvnum føti eru størri.

Bólkarnir í kappingini eru hesir: 16 ár og yngri, har gentur og dreingir kappast hvør sær. 20 ár og yngri, har gentur og dreingir kappast hvør sær. Opin bólkur, hasr kvinnur og menn kappast hvør sær, og har luttakararnir eisini verða býtt í vektflokkar. Hjá monnum er markið fyri teimum báðum vektflokkunum 75 kg, meðan tað hjá kvinnum er 61,5 kg. Ein bólkur er eisini fyri tey, sum eru 35 ár og eldri.

### Lið- og blandað

At enda verður talan eisini um kappingar fyri lið og í sonevndari blandaðari kapping.

Í liðkappingini eru seks rógvarar á hvørjum liði, og kunnu bæði kvinnur og menn vera á hesum liðum. Hvør rógvari rør her 500 metrar. Tíðin, sum einstaki rógvararnir her nýta, verður so umroknaður eftir serligum frymli, soleiðis at úrslitið verður sett í mun til aldur, kyn og vekt.

Sami frymil er eisini galdandi í blandaða bólkinum. Eisini her skulu 500 metrar rógvast, og so verður endaliga úrslitið gjørt upp sambært serliga frymlinum.

## Fíggjareftirlitið kannar AaB

Felagið hjá Súna Olsen og Jón Róa Jacobsen er biðið um at svara, hví teir hava inntøkurført 12 mió kr. í sambandi við víðarisølu. Víðarisølan viðvíkur ognarpartinum hjá AaB í sonevnda KMD-høvuðssætinum.

Í felagnum vilja teir tó vera við, at tað einki er forgjørt í hesum.

– Vit hava sjálvandi svarað fyrispurninginum, sum vit hava fingið. Sum eg síggja tað, so vilja tey í Fíggjareftirlitinum bara síggja, hvussu hetta er bókað hjá okkum. Tað hava tey nú fingið at vita, og so rokni eg við, at tey taka støðu út frá hesum, sigur Per Søndergaard, nevndarformaður í AaB A/S.

AaB hevði annars í 2005 eitt yvirskot á 4 mió kr. Vil Fíggjareftirlitið ikki góðkenna transaktiónirnar kring víðarisøluna, verður hetta broytt til eitt hall á 8 mió kr.

**-mørk**

## Sigurð, Petra og Pól vóru fremst í marathon

Leygardagin skipaði Roysnið fyri árliga nýggjárshálvmarathon. Runnið var av Funningsvegnum og út á Toftir

Veðrið var ikki av tí besta, men kortini vóru 19 luttakarar møtt til kappigina. Serliga hevði vindurin hug at arga rennararnar, sum allan teinin høvdu ættina mest sum beint ímóti.

Tí er einki at siga til, at tíðirnar hjá rennarunum ikki vóru so góðar, sum tær onkra tíð hava verið, men hetta merkti ikki lagið kortini. Serliga ikki, tá tey eftir kappingina vórðu boðin til Svangaskrað, har ein góður drekkamuður og pannukøkur vóru at fáa.

Hjá monnum var Sigurð Justinussen úr Bragdinum fyrstur á mál. Hann hevði tíðina 1.27.04. Hjá kvinnunum var Petra Gardar Neumann fyrst um málstrikuna í 1.51.26, og hjá veteranunum var tað Pól Sundskarð, sum var fyrstur á málið. Hann hevði tíðina 1.37.57.

Einstøku úrslitini hjá rennarunum síggjast annars á heimasíðuni, www.athletics.fo.

**-mørk**



*Komin úr Funningsbotni hildu rennararnir fram eftir landsvegnum millum Fjarða*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

## Staunton møguliga írskur landsliðsvenjari

Eftir síðstu undankapping, har tað ikki eydnaðist Írlandi at kvalifisera seg til HM-endaspælið, gjørdi venjarin Brian Kerr av at gevast. Fleiri royndir venjarar hava verið settir í sambandi við venjarasessin eitt nú Sir Bobby Robson, Terry Venables og Martin O´Neill.

Men nú er líkt til, at tað verður tann lutfalsliga óroyndi Steve Staunton, ið gerst landsliðsvenjari hjá Írlandi. Samráðingar hava verið millum Staunton og írska fótbóltssambandið, og tað frættist, at samráðingarnar hava gingið væl.

Staunton er í løtuni hjálparvenjari hjá Paul Merson í Wallsall, og hann hevur leikt 102 landsdystir fyri Írlandi, og tað er met.

**-SíS**